# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Anna og Kalle Hansen gullbrúdleyp



Í morgin, týsdagin 12. september, kunnu Anna og Kalle Hansen í Klaksvík halda gullbrúdleyp.

Anna er ættað av Heygum í Klaksvík. Hon er elst av teimum sjey børnunum hjá Petru og Hugo Gardar.

Eftir tíggju ára skúlagongd starvaðist Anna fyrst í Thule bókhandli, sum Eliesar Poulsen hevði á Biskupsstøð, og so var hon í nøkur ár skrivstovukvinna á Varpinum, har Kjølbro hevði timburhandil, snikkaraverkstað og møblasølu. Seinni var hon á kontórinum hjá Kjølbro á Gørðum.

Tá ið Anna fyri hálvt hundrað árum síðani giftist, segði hon upp. Soleiðis var tað tá í tíðini. Giftar kvinnur vóru við hús og tóku sær av húsi og heimi, og tað hevur Anna gjørt væl og virðiliga.

Kalle er ættaður av Tvøroyri, sonur Nicolinu og Kalla Hansen. Kalle hevur eitt nú røtur í Klaksvík. Onnur omman, Ellen Cathrina, var ættað úr Heimistovu á Uppsølum.

Kalle var ungur, tá ið hann kom til Klaksvíkar at læra seg lidnan á bedingini. Síðan fór hann á maskinskúla, og eftir lokið prógv ætlaði hann sær at sigla sum maskinmaður. Men tað eydnaðist ikki í fyrstu atløgu, tí hann slapp ikki at mynstra orsaka av vantandi tuberklabevísi.

Tuberklabevísið fekk Kalle í 1956, og um somu tíð, sum tey bæði giftust, fekk Kalle kjans við Atlantsfarinum. Seinni sigldi Kalle við Jóannesi Patursson, Stellu Mariu og Stellu Karinu. So var hann í knappliga 20 ár álitisfullur og nærlagdur maskinmeistari við trolarum hjá Kjølbro.

Hesi árini keypti Kjølbro fleiri trolarar, og Kalle var við at føra tríggjar nýggjar trolarar til Klaksvíkar – Sjúrðarberg í 1971, Sundaberg í 1973 og Skálaberg í 1976. Frá 1988 til 2000 var Kalle maskinmeistari við trolarunum hjá Mortani Johannesen, og í 1989 var hann við til at føra Enniberg sum nýbygning til landið.

Anna og Kalle eiga fýra børn. Petra (1957), Kalli (1959), Jógvan Hugo (1960) og Niels (1970). Petra og Kalli búgva í Klaksvík, Jógvan Hugo býr á Glyvrum, og Niels býr í Ålborg. Ommu- og abbabørnini eru 11 í tali.

Anna og Kalle, sum eru friðarfólk, eiga hugnaligt heim á Skáltavegi á Kósini. Tey hava verið trúgv í missiónshúsinum Emmaus, har Anna, sum hevur dámað væl at lisið, í mong ár hevur havt ábyrgdina av bókasøluni.

Stóri dagurin verður hildin við vælkomst í Emmaus týskvøldið klokkan 18.

**J**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður, fosturpápi, verfaðir, abbi, langabbi, bróður og svágur okkara

**Joen Peter Ellingsgaard**
vanliga nevndur Pedda í Garði, á Eiði,

andaðist á Landssjúkrahúsinum 9. september, 85 ára gamal.

Kistan fer av Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 18.30.
Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju mikudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Sonja, Poul og Hans Petur**

*Tey, ið vilja minnast Pedda kunnu lata Eiðis kirkju eina gávu, konto í peningastovnunum.*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður og beiggi okkara

**Kristian Edvard Rókstein**
Fuglafirði

andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 7. september, 85 ára gamal.
Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mánadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Siloa týsdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Thala og Karin**

*Tey, ið vilja minanst Kristian, kunnu lata eina gávu til Siloa, konta í peningastovnunum.*

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Dánjal Jákup Johannesen**, vanliga nevndur **Dánjal Eysturi í Líð, á Nesi**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 9. sept., 93 ára gamal.

**Jacobina Berg, Hvalba**, vanliga nevnd **Bina**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 9. sept., 83 ára gomul. Bønarhald verður í kapellinum á LS kl. 11 týsdagin 12. sept., og kistan fer suður við Smyrli týsdagin kl. 12.30. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju mikudagin kl. 13.

**Elisabeth Brimsvík**, vanliga nevnd **Bette á Strondum**, andaðist í heiminum leygardagin 9. sept., 76 ára gomul. Kistan fer úr heiminum í kvøld kl. 18 í Nerija á Skála.

Kistan við **Christian Rókstein, í Fuglafirði** fer av Landssjúkrahúskapellinum í dag kl. 17. Jarðarferðin verður úr Siloa týsdagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Christian, kunnu lata eina gávu til Siloa.

**Joen Peter Ellingsgaard**, vanliga nevndur **Pedda í Garði, á Eiði**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 9. sept. 85 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 17.30. Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju mikudagin kl. 14.

**Marita Joensen, fødd Justinussen**, ættað úr **Leirvík** búsitandi í **Esbjerg**, andaðist 8. september, 76 ára gomul. Jarðarferðin verður hósdagin 14. sept. kl. 13.30 frá Gravlundens Kapell.

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi tá kæra mamma og vermamma okkara

**Inga Hansina Weihe**
Skála

doyði og varð jarðað.

Tøkk til Heimarøktina, Sambýlið á Skála og Landssjúkrahúsið.
Tøkk til Berg D. Joensen og Jógvan Fríðriksson, prestar, fyri troystarrík orð.
Tøkk fyri uppringingar, blómur, kransar, gávur til Skála kirkju og tykkum øll, ið hjálptu til á annan hátt við jarðarferðina og ervinum.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Kári og Majbritt**

---

**Dagurin í morgin**

**12. september. Guido**, deyður í 1012. Guðrøkin ungur maður, sum gjørdi fleiri pílagrímsferðir. Heimafturkomin doyði hann í Anderlecht í Hálandi av stravnu ferðum sínum. Fleiri undurverk hendu við grøv hansara, og tí varð hann lýstur halgimenni.

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi, langabbi og oldurabbi okkara

**Petur Danielsen**
vanliga nevndur Petur á Hvítanesi

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk til talarar, sangarar og spælarar.
Eisini ein tøkk til starvsfólki á Sambýlinum Oman Hoydalar.
Tøkk fyri minnisgávur til Føroya Blindastovn.
Tøkk til tykkum, sum sendu blómur og fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her.

*Vegna tey avvarðandi*
**Signhild**